# Meiri stuðul til Jón Brian

**Heldur ikki Føroysk Miðlafólk vilja sita hendur í favn, nú ein av limum teirra stendur at verða koyrdur úr sínum starvi**



*Forkvinnan í Føroysk Miðlafólk, Anna V. Ellingsgaard. »Grundgevingarnar fyri uppsøgnini eru eisini, eftir fatanini hjá Føroyskum Miðlafólkum, púra burturvið og eru at fata sum eitt álop á royndina at verja tey journalistisku virðini og arbeiðshættirnir á ábyrgdarfullan hátt«, sigur hon og nevndin í stuðulsfráboðanini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÆTLANARSKRIV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur skapt fitt av øsing, at Jón Brian Hvidtfeldt, tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya, millum jól og nýggjárs fekk handað ætlanarskriv frá stjóranum, Anniku Mittún Jacobsen.

Jón Brian Hvidtfeldt sjálvur afturvísti øllum ákærum í skrivinum, sum hann eisini mótmælti, og hann heitti somuleiðis á stjóran um at taka ætlanarskrivið aftur.

Kjarnan í málinum tykist vera, at tíðindaleiðarin ikki metir, at tíðindaparturin av sendiflatuni hjá Kringvarpinum verður nóg høgt raðfestur, og tað er hetta, ið Annika Mittún Jacobsen eftir øllum at døma skýrir samstarvstrupulleikar.

Hin grundgevingin í ætlanarskrivinum er ovurnýtsla av peningi í triðja ársfjórðingi 2009, men hesum hevur tíðindaleiðarin eisini afturvíst og sambært Jón Briani Hvidtfeldt sjálvum eisini dokumenterað.

Annika Mittún Jacobsen metir tó, at hesi bæði omanfyri nevndu eru so álvarslig mál, at hon hevur mist álitið á, at Jón Brian Hvidtfeldt megnar at reka tíðindadeildina við teirri játtan, sum er sett av til endamálið.

Og tí hevur hon sum nevnt sent tíðindaleiðaranum ætlanarskrivið, sum Jón Brian Hvidtfeldt so skal svara innan 14 dagar eru farnir frá 29. desember 2009 at rokna.

## Miðlafólk mótmæla

Í gjár kom fram í miðlunum, at meginparturin av starvsfólkunum á tíðindadeildini hjá Kringvarpinum hevði skrivað undir eitt mótmælisskriv til stjóran har kravt var, at ætlanarskrivið verður tikið aftur.

»Vit hava fult álit á, at Jón Brian Hvidtfeldt hevur røkt sínar uppgávur eftir teimum umstøðum, hann hevur havt at arbeiða undir. ... Tí krevja vit, at ætlaða uppsøgnin av Jón Brian Hvidtfeldt verður tikin aftur«, skriva tey 17 starvsfólkini á tíðindadeildini.

Og nú hevur eisini felagið hjá fjølmiðlafólkum í Føroyum gjørt vart við seg. Í einari stuðulsfráboðan sigur felagið Føroysk Miðlafólk, at tey fult og heilt stuðla Jón Brian Hvidtfeldt í hesum máli.

»Allar vanligar mannagongdir í hesum sambandi, eitt nú viðvíkjandi ávaringum, eru lopnar um í hesum máli. Hetta kann sjálvsagt ikki góðtakast. Grundgevingarnar fyri uppsøgnini eru eisini, eftir fatanini hjá Føroyskum Miðlafólkum, púra burturvið og eru at fata sum eitt álop á royndina at verja tey journalistisku virðini og arbeiðshættirnir á ábyrgdarfullan hátt«, sigur felagið millum annað í skrivinum.

Í skrivinum lovar felagið eisini at rinda fyri løgfrøðiligan stuðul til Jón Brian Hvidtfeldt, og tað er ein týðilig ábending um, at felagið ikki ætlar sær at tosa uttan at handla.

Í hvussu er ber til at staðfesta, at seinasti leikurin í hesum talvi ikki er fluttur enn.



Til
Anniku Mittún Jacobsen

Tórshavn 31.12.09

Tíðindadeildin hjá Kringvarpinum mótmælir at okkara tíðindaleiðari, Jón Brian Hvidtfeldt, nú verður sagdur úr starvi.

Vit hava fult álit á, at Jón Brian Hvidtfeldt hevur røkt sínar uppgávur eftir teimum umstøðum, hann hevur havt at arbeiða undir.

Vit vilja samstundis vísa á, at Jón Brian Hvidtfeldt er fakliga sera kompetentur, men Tíðindadeildin hevur ikki havt nóg stóran part av samlaðu játtanini til at útinna sínar kjarnuuppgávur, sum hoyra til public-service skyldurnar hjá Kringvarpi Føroya.

Tí krevja vit, at ætlaða uppsøgnin av Jón Brian Hvidtfeldt verður tikin aftur.

Vit vilja samstundis biðja um fund við stjóran í seinasta lagi mikudagin 6. januar at umrøða málið nærri.

Vinarliga
Leivur Frederiksen
Dánjal Højgaard
Ingolf S. Olsen
Johnsigurd Johannesen
Óluva Zachariasen
Elin Winther Poulsen
Ingi Rasmussen
Sigmar Bláberg
Rúni F. Kjær
Herluf Sørensen
Høgni í Jákupsstovu
Karolina Thostrup
Dia Midjord
Kaj Joensen
Jógvan Hugo Gardar
Jóhann Mortensen
Sigrún H. Brend



Føroysk Miðlafólk stuðla Jón Briani Hvidtfeldt og krøvum hansara mótvegis Anniku Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóra.

Stutt fyri nýggjár fekk Jón Brian Hvidtfeldt, tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya og fakfelagslimur í Føroysk Miðlafólk, ætlanarskriv um uppsøgn.

Allar vanligar mannagongdir í hesum sambandi, eitt nú viðvíkjandi ávaringum, eru lopnar um í hesum máli. Hetta kann sjálvsagt ikki góðtakast. Grundgevingarnar fyri uppsøgnini eru eisini, eftir fatanini hjá Føroyskum Miðlafólkum, púra burturvið og eru at fata sum eitt álop á royndina at verja tey journalistisku virðini og arbeiðshættirnir á ábyrgdarfullan hátt.

Fyri ikki at skaða málsgongdina, fara vit ikki at viðgera smálutir hesum viðvíkjandi alment, men vilja bert gera greitt, at Føroysk Miðlafólk av fullum huga stuðla Jón Briani Hvidfeldt í hesum máli og hansara kravi um afturtøku av ætlanarskrivinum um uppsøgn.

Somuleiðis rindar Føroysk Miðlafólk fyri løgfrøðiligan stuðul og aðra serkøna hjálp, Jón Briani Hvidtfeldt tørvar í hesum máli.

Vinarliga

Nevndin í Føroysk Miðlafólk